Hósdagur 13. januar

7.00 Tíðindi
7.03 Morgunlestur
7.15 **Barnaløtan** - Jonna Olsen og Katrin Nolsøe Joensen stíla fyri.
7.30 **Tíðindi**
7.35 **Góðan Mogun Føroyar**
8.00 **Tíðindi**
8.05 **Góðan Mogun Føroyar**
9.00 **Tíðindi**
9.05 **Morgunlestur** (e)
9.15 **Dagsins tónar**
9.30 **Reportasja** (e) - Per Højgaard og Kári Durhuus leggja til rættis
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Fimleikaløtan** - Elna & Egga skipa fyri.
10.10 **Lurtararnir og vit** - Elis Poulsen stílar fyri
11.00 **Tíðindi**
11.01 **Úr líðum og fjøllum** (e) - Ferðafrásøgn frá árinum 1899 eftir danska búnaðarfrøðingin Peter Feilberg. Árni Dahl týddi. Sverri Egholm lesur. 5. partur.
11.30 **Undir døgurða**
12.00 **Veðurtíðindi**
12.02 **Middagstónleikur**
12.15 **Skráin og lýsingar**
12.20 **Tíðindini og ítróttur**
12.40 **Døgurðatónar**
13.01 **Tónatímin**
14.00 **Tíðindi**
14.01 **Fimmarin** (e)
15.00 **Tíðindi**
15.01 **Nýtt og gott gamalt** - Høgni Zachariasen velur løgini
16.00 **Tíðindi**
16.01 **Rokkstovan** - Rasmus Rasmussen stílar fyri
17.00 **Tíðindi**
17.05 **Geykn** - Jóhannes Miðskarð og Maria Abrahamsen stílar fyri
18.00 **Barnaløtan** (e) - Jonna Olsen og Katrin Nolsøe Joensen stíla fyri.
18.25 **Skráin og lýsingar**
18.30 **Tíðindini**
19.00 **Í grannalagnum** - Suni Merkistein stílar fyri
19.30 **Harmonikutónar** - Flóvin Jacobsen stílar fyri
20.30 **Tornið á heimsins enda** - 4. partur av skaldsøgu eftir William Heinesen. Hans Thomsen týddi og las.
21.00 **Tíðindi**
21.05 **Vaglið**- Ginna Midjord og Bjarni Mohr leggja til rættis
23.00 **Tíðindi**

18,30 **Øskufía** 2:26
19,00 **Krosskast** (e)
20,00 **Dagur og Vika við Grannum okkara**
20,50 **Eitt lív í marglæti** - do. dokumentar
21,50 **Deyðir náttagalar** 5:5 - ensk krimirøð
22,55 **Ferðafrásøgn: Amsterdam**
23,40 **South Park** 8 - am. kult-teknirøð
0.05 **Liðugt**

5.00 **Børne-hjørnet med Disney**
7.15 **TV-shop**
8.10 **Hvide Løgne**
8.35 **Alle tiders barnepige**
9.05 **Ricki Lake**
10.00 **Hun så et mord**
10.55 **Horton-sagaen**
11.45 **Horton-sagaen**
12.35 **Drew Carey**
13.05 **Sjov og Spas**
13.30 **Panter-tanter**
14.00 **Det lille hus på prærien**
14.55 **Interne affærer**
15.50 **Sjov og Spas**
16.20 **Ricki Lake**
17.15 **Dagens Nyheder på TV3**
17.30 **Alle tiders barnepige**
18.00 **Sabrina - skolens heks**
18.30 **Hvide Løgne**
19.00 **Efterlyst Special**
19.30 **Opkald fra en morder**
21.10 **SexOrama**
21.40 **Verdens værste naboer**
22.10 **Dagens Nyheder på TV3**
22.20 **Drew Carey**
22.50 **Skadestuen**
23.45 **Monty Pythons flyvende cirkus**
0.20 **I lyst og nød**
0.50 **Ellen**
1.20 **Caroline, karrieren og kærligheden**
1.50 **Hvide Løgne**
2.20 **Godnat**

EUROSPORT

7.30 **Rally**
8.00 **Biathlon**
8.30 **Cross-Country Skiing** - live
9.30 **Rally**
10.00 **Cross-Country Skiing** - live
12.00 **Cross-Country Skiing**
13.15 **Biathlon** - live
15.15 **Cross-Country Skiing**
16.30 **Snowboard**
17.00 **Tennis**
19.30 **Football**
21.30 **Rally**
22.00 **Boxing**
23.00 **Tennis**
0.00 **Rally**
0.30 **Close**

BBC WORLD

0.00 **World News – Weather**
0.30 **HARDtalk**
1.00 **News – Weather**
1.30 **Holiday**
2.00 **News – Weather**
2.30 **The Money Programme**
3.00 **News – Weather**
3.30 **Asia Today**
3.45 **World Business Report**
4.00 **News – Weather**
4.30 **HARDtalk**
5.00 **News – Weather**
5.30 **Top Gear**
6.00 **World News – Weather**
6.30 **Europe Direct**
7.00 **World News – Weather**
7.30 **HARDtalk**
8.00 **World News – Weather**
8.30 **The Money Programme**
9.00 **World News – Weather**
9.30 **HARDtalk**
10.00 **World News – Weather**
10.30 **Holiday**
11.00 **The World Today**
12.30 **The Money Programme**
13.00 **World News**
13.15 **World Business Report – Weather**
13.30 **The World Today**
14.30 **Top Gear**
15.00 **World News – Weather**
15.30 **HARDtalk**
16.00 **World News – Weather**
16.30 **The Money Programme**
17.00 **World News**
17.15 **World Business Report – Weather**
17.30 **Talking Movies**
18.00 **World News – Weather**
18.35 **World Business Report**
18.45 **World Sport**
19.30 **HARDtalk**
20.00 **World News – Weather**
20.30 **Panorama**
21.00 **World News**
21.10 **World Business Report – Weather**
21.30 **Earth Report**
22.00 **World News**
22.30 **Europe Direct**
23.00 **World News – Weather**
23.30 **World Business Report**
23.45 **Asia Today**

BBC PRIME

0.00 **TLZ: »Wheeler on America«**
1.00 **TLZ: »Essential History Europe – Germany«**
1.30 **TLZ: »Essential History Europe – Greece«**
2.00 **TLZ: »Wembley Stadium – Venue of Legends«**
2.30 **TLZ: »Blue Haven«**
3.00 **TLZ: »The True Geometry of«**
3.30 **TLZ: »The Science of Climate?«**
4.00 **TLZ: »Revista«**
4.15 **TLZ: »Revista«**
4.30 **TLZ: »Spanish Globo«**
4.35 **TLZ: »Isabel«**
4.55 **TLZ: »Spanish Globo«**
5.00 **TLZ: »Computing for the Terrified«**
5.30 **TLZ: »Look ahead«**
6.00 **Mortimer and Arabel**
6.15 **Playdays: »Playground Stop«**
6.35 **Get your own back**
7.00 **The Biz**
7.30 **Going for a Song**
7.55 **tyle Challenge: »City Hospital«**
8.20 **Real Rooms: »Rugby Castle Bedroom«**
8.45 **Kilroy: »I'm married but I'm gay«**
9.30 **EastEnders**
10.00 **Antiques Roadshow: »Ickworth House«**
11.00 **TLZ: »Great Picture Chase – Toyah Wilcox«**
11.30 **Ready Steady Cook**
12.00 **Going for a Song**
12.25 **Real Rooms: »Rugby Castle Bedroom«**
13.00 **tyle Challenge: »City Hospital«**
13.30 **EastEnders**
14.00 **Ground Force: »West Hanney«**
14.30 **Ready Steady Cook**
15.00 **Mortimer and Arabel**
15.15 **Playdays: »Playground Stop«**
15.35 **Get your own back**
16.00 **Classic Top of the Pops**
16.30 **Bread**
17.00 **Allo Allo**
17.30 **The Antiques Show**
18.00 **EastEnders**
18.30 **Vets in Practice: »A Family Affair«**
19.00 **All along the Watch Tower: »One Flew over the Cuckoo's Nest«**
19.30 **Only Fools and Horses: »Cash and Curry«**
20.00 **Casualty: »Seeing the Light«**
21.00 **Shooting Stars**
21.30 **Comedy Nation**
22.00 **Clothes in the Wardrobe**
23.20 **Songs of Praise**

SvF – Hósdagur kl. 20.50:

Eitt lív í marglæti

– donsk dokumentar

Tey ríku koyra í Mercedes og Ferrari og búgva í glæsiligum borgum, sum kosta fleiri miljónir. Men hvussu fáa tey ráð til hetta? DR-dokumentar vísir okkum, hvussu tey ríkastu í Danmark kunnu liva eitt lív í marglæti fyri einum brotparti av tí, sum hetta lívið hevði kostað einum vanligum danskara.

TV3 – Hósdagin kl. 19.00:

Efterlyst Special

Aftan at meira enn 5000 fólk eru avhoyrd, letar løgreglan framvegis eftir manninum, sum hin 13. juni 1995 framdi eitt av ógvusligastu morðunum í donsku søguni, tá hann myrdi hina 7 ára gomlu Roujan Ismaeel á Nørrebro í Keypmannahavn. Brotsgerðin hendi á alljódum degi, men kortini er maðurin ikki funin enn.

Løgregluovstin í Keypmannahavn, Kurt Jensen, sigur, at um ein rithøvundur hevði skrivað eina bók um eina slíka hending, høvdu flest fólk sagt, at hetta ikki kann lata seg gera, men tað er altso hent.

TV3 – Hósdagin kl. 19.30:

Opkald fra en morder

Amerikanskur spenningsfilmur frá 1994

Mark Janek, sum er útvarpsvertur og plátuvendari, hevur javnan marruna um morðið á gentu sína. Eitt kvøldið ringir telefonin, og í horninum er ein dulnevnd kvinna, sum sigur seg hava rænt eina gentu, sum Jim hevur verið saman við. Tá gentan seinni verður funnin deyð, verður Jim lagdir undir morðið, og tískil má hann nú í holt við at prógva, at hann er ósekur, eins og hann má forða fyri, at dráps maðurin ella –kvinnan ger enn meira um seg.

TV3 – Hósdagin kl. 21.10:

SexOrama

SexOrama fylgir í hesi sendingini við bordeleigarinum, 32 ára gomlu Dianu, sum rekur sítt egna virki í Valby.

Vit síggja, tá Diana hevur kundar við sær í kjallarinum, og samstundis greiður hon frá, hvussu hennara lív er, og um hvussu ymsir kundar hennara eru.

Eisini hitta vit telefongentuna, Camilla, sum nú eisini sleppur at royna seg í heimsins elsta yrki. SexOrama fylgir eisini við í gerandisdegnum hjá Dianu, hvussu hon ger alnetalýsingar, vaskar klæðir, keypir blomstur, skógvar og mat. Tað er jú soleiðis, at Diana eisini hevur nógv annað at gera, so hon kann ikki liggja á lakinum alla tíðina.

TV3 – Hósdagin kl. 21.40:

Verdens værste naboer

Ensk dokumentarsendirøð

Allir íbúgvarnir í lítla walisiska býnum, Cefn Mawr, eru bangnir fyri granna teirra, einum stórum kemiskum virki, sum alla tíðina letur ymisk hættislig evni út í umhvørvið. Í fleiri ár hava íbúgvararnir stríðst móti myndugleikunum, men einki hevur hjálpt. Í sendingini síggja vit fleiri av hesum greiða frá, hvussu tað er liva við slíkar ræðslu alla tíðina.

Eisini verður vitjað hjá John og Brenda Laws, sum so at siga ikki síggja dagsljós, tí fyrrverandi eigarin av húsunum gróðursetti nøkur stór trø ov nær at húsunum. Trøini veksa yvir ein metur um árið, men afturfyri hevur fyrrverandi eigarin boðið seg til at keypa húsini aftur – fyri helvtina av upprunaliga keypsprísinum.

Viðmerking:

Móðurlíkismál og málspilla ella móðurmál og málrøkt?

Heitið á nýggja máltáttinum í Útvarpi Føroya, *dagsins málspilla*, er ikki júst nakað fagurlátað orð hjá móðurmálslingum. Ein bíðar spentur eftir, hvat nú man fara at vera roknað sum spilla, og kanska dagsins paradoksi um hvat ið *ikki kann sigast*, men sum kortini kann sigast uppí saman? Tíbetur vísir tað seg , at hesin málspillutáttur er meiri málrøkt enn málspilla. Men hví so brúka orðið *spilla*, ið er eitt sera niðursetandi orð? *Røkt* harafturímóti er eitt meiri uppbyggjandi og positivt orð, og er ikki so niðrandi og peikifingra-fikserað.

Okkara móðurmál, tað tosaða málið, er sum øllum kunnugt málið frá móðurtungu, sum ein er alin upp við og hevur lært sum barn. Tað er ein integreraður partur av einstaklinginum, og myndar støðið í okkara málsligu tilvitsku. Móðurmálsbúnin kann vera líka so ymiskur sum klædnabúnin, og ymiskleikin ella frábrigdið nýtist ikki at vera *spilla* men kann vera málsligt fjølbroytni ella nuansa. Skrivaða føroyska samskiftismálið er í ávísan mun eitt móðurlíkismál, ið enn er ov stirvið og klerkakent til, at tað nøktandi kann endurgeva móðurmálið við tess breidd, dýpd og nuansum.

Okkara móðurmál er ikki ólíkt einum grasvølli har grasið í nátúrugivnan mun festir rót óheft av danafobum ella íslandufilum prævalensi. Graslíkisvøllurin harafturímóti er meiri líkur móðurlíkismálinum, eitt meiri statiskt "teknisk" produkt, hvørs eginleikar ein kann stýra á kensluleysum pappíri.

Hóast okkara móðurmál er fult av vælhóskandi altjóða orðum, bæði praktisk funktionellum og teimum meiri abstrakt háfloygdu, so hava hesi altjóða orð ofta ilt við at sleppa uppí part, har sum skrivaða móðurlíkismálið ræður. Hetta ger, at vit hava trupulleikar við tí skrivaða málinum, serliga á tí meiri abstrakta økinum. Sjálvt altjóða fakorð og staðarnøvn verða latin í rotuskógvar, skornir til eftir atavistiskum eingjagarðsleisti. Málið verður eins og ein rebus, har fólk skulu sita og gita um hesi nýyrði. Hetta er stórt spell, tí tað er alneyðugt við stórum viðkomandi og orðaríkum málbasa, um fólk skulu kunna velja kompetent. Tað er almент viðurkent, at abstrakt hugsan er neyvt knýtt at málinum, og skal ein síta og gita sítt egna "móðurmál", verður hugflogið hareftir. Á flótandi máli gongur tað annars skjótt fyri seg. Í eini vanligari samrøðu brúka vit um 4-5.000 orð um tíman, og vit lesa um 15.000 orð um tíman.

Tað skrivaða málið er í dag so mikið væl fyri og kjølfest í góðum orðabókum, at tað uttan stórvegis trupulleikar eigur at kunna fevna um ein nógv størri part av okkara móðurmáli, tí tosaða málinum. Hetta letur seg væl gera um okkara lingvistar, sum fyrst og fremst taka støðu í tí tosaða málinum, gerast meiri sjónligir í málrøktingarbólkinum. Skal vanligi føroyingurin kenna seg heima í tí skrivaða málinum, má tað gerast meiri móðurmálsliga viðkomandi, samstundis sum tað verður gjørt meiri einfalt at skriva føroyskt. Móðurmálið er fyrst og fremst ein samskiftismiðil og ikki bert ein pyntidukka hjá puristum.

Dagsins málspilla ?

Tað kann mangan undra, at móðurmálslig fynd ikki vinnur á tí viðhvørt sjálvuppgjørda móðurlíkismálinum. Eitt nú tá forlornar tenn í tí annars frálíku "móðurmálsorðabókini" verða róptar "handilstenn" enntá sum tannlæknafrøðisheiti. Heitið er niðrandi og tillátursgerandi. Høvisku heitini eru forlornar tenn ella (tann)protesa, men tey eru als ikki við í bókini.

Í einum málspillutátti varð sagt, "at binda hund við smørleyp" er tað sama sum "at seta rev at ansa gæsnum". Fyrra var føroyskt og tí var nóg mikið at hava tað. Hesi orðatøk geva heilt ymiskar assosiatiónir (hugmyndasambond). Í seinna hevur ein skálkin aftan fyri oyra. Um smørleypin veit fáur frá at siga í dag, men revurin og gásin eru vælkend, eisini frá barnaspølum og mugu roknast at vera eins føroysk og kamelurin og nálareygað í halgubók.

Eisini (danski) peikifingurin stóð fyri skoti, tí tað eitur fremstfingur, varð sagt. Áhugavert, tí fyri at hava ein fremstafingur, er neyðugt at tummilin ikki verður roknaður sum fingur. Danir rokna "tommelfinger" fyri fingur og hava ikki orðið fremstifingur, men "pegefinger". Vit og eingilsmenn hava tummil (thumb) og fremstafingur (forefinger) ella peikifingur (index finger). Í hesum føri er kanska als ikki talan um danismu, men um somu funktionellu loysn sum eingilmenn hava.

Kampagna bleiv til *herferð*, og á Argjum fóru tey í *herferð* fyri at fáa børn at ganga í sunnudagsskúla, segði Útvarp Føroya. Annars hava vit bæði sjampo og sjampanju við í orðabókunum, so hví ikki kampagnu eisini? Sagnorðið, *at brúka*, er tagt burtur, tað hoyrist í hvussu er einki til tað longur. Kanska liggur tað ov nær tí danska, *at bruge*. Nú hoyrist bert, *at nýta*. Hetta er óheppið, tí tað fellur í mongum førum saman við sagnorðinum, *at njóta*, ella lýsingarorðinum, nýtt/(gamalt). Mong hava spurt hví, men ongin fær svar.

Latið ár 2000 verða byrjanina til eina lingvistisk nøktandi tillaðing millum

móðurmálið og móðurlíkismálið, og eina einfaldgering av skrivimálinum, soleiðis at eisini móðurmálsligu Marsanna og Palliba kunnu føla, at tey eiga eitt virðiligt móðurmál - tosað sum skrivað. Men ikki minst vil hetta viðføra, at føroyskt sum samskiftismál verður hópin lættari og rættari handfarið av teimum sum dagliga brúka tað. Farvæl dagsins málspilla, vælkomin dagsins málrøkt!

Regin Eikhólm

ÁSTSKOTIN Í MÁL-TÍÐARFLÓÐ

1. **(1. táttur) Kvæðamál**
Vilja tær nú líða á,
meðan eg man kvøða
um teir tríggjar tættirnar,
sum eg vil nú umrøða.
Grani bar gullið av heiði.
2.
Tógva eru verurnar
í hvørjum tátti búgva,
og um tað málsligu fótaferð
hagar skal kvæðið snúgva.
3.
Tveggja vuksu ungdómar
upp á bygd í forum.
Fljóðið eingin vænari sá
- fríð sum blóman í skorum.
4.
Hann var sær ein menjarbaldur
við alskins mekt og meingi,
ástskotin í beygalín
- vær bíðum ikki leingi.
5.
Álvardansur í skýmandi høll
greppur søkir drós,
rúnarbundust í setandi sól,
tá ongin hani gól.
6.
Freia ástbindur drós og grepp
við miklum frumástar skrúð.
Høggur so droyri í kroppi hans'
sum brandar í randargný.
7.
Akslagrein yvir sprundið sló,
drósið seg undan dró.
Fyrst sjá mær tína eggjateinsfynd
- eg gerist tín leikalind.

8. **(2. táttur) Setursmál**
Nú skal lætta ljóðið av
og taka upp annan tátt.
Setursfrøðis máliskur
seta húnarhátt.
9.
Pílika og pílikur
við skiftilin høvdu starv.
Gjørdust síðan ástskotin
tá skammfuktin hon hvarv.
10.
Komið út í torra
men nakað undan gø,
hittust sveinur og ungmoy
tætt við desastøð.
11.
Føldu seg sum ravhúsalað
í einum siguløki, (sigul=magnet)
sendu rin av sigulmagni,
sum fór fløkt kring tey.
12.
Hann var í rankari vøgu
- ein sigulmagnaður flytil.
Hetta var ein ilsvíggja
støða at koma í.
13.
Hjørtu teirra hamraðu
sum uppblástir skroyvibjølgar.
Hon var tó so biðlavond,
hann slapp sær heim til høldar.

14. **(3. táttur) Gerandismál**
Nú skal taka upp triðja tátt
og leggja brátt í vaðið.
Um tann forelskaða Palliba
hagar vendi eg kvæðið.

15.
Marsanna og ungi Palliba,
tineygjarar tveir.
Ikki vil eg nevna fleir,
men halda meg til teir.
16.
Í diskodans tey djollaðu sær,
og vóru ei sjalu,
um tú hugdi annan veg
og kanska hevði hug.
17.
Ei á diskotekunum
tú finnur lekrari steik,
og heldur ikki í klubbanum
tú finnur flottari sjeik.
18.
Eg tími ikki at vera her,
sjálvt um tú ert ker.
Eg ætli mær við AFS
- út í ta stóru verð.
19.
Hann sum kovboy fór avstað
og sá ta stóru verð.
Hon fór í tað langa rað
og arbeiddi sum au pair.
20.
Kvæðamál og Setursmál
og Pallibasa tunga
eiga øll hvør sína sál,
sum júst her hevur rungað.
21.
Málið er títt og málið er mítt
- *móðurmálið bæiða*
*ORÐIÐ*að er altíð frítt
- um tú torir tað eiga.
Grani bar gullið av heiði.
(á Kyndilsmessu 1996)

Regin Eikhólm